**Fylgiskjal 5**

# UPPLÝSINGAR UM UMSØKJARA

Upplýsingar um niðanfyri standandi viðurskifti skulu latast inn fyri hvønn einstakan umsøkjara

## 1. Bygnaður

| | |
|---|---|
| Føroyskt felag/deild: | Navn og bústaður hjá føroyska felagnum/deildini.<br>Umsøkjarar, ið ikki hava dóttirfelag ella skrásetta deild í Føroyum, skulu hava fingið hetta í rættlag innan 3 mánaðir eftir, at loyvið er givið. |
| Løgfrøðiligur formur: | Løgfrøðiligi formurin hjá føroyska felagnum/deildini |
| Stjóri / leiðari og nevnd: | Navn á og bústaður hjá leiðaranum av føroyska felagnum/deildini.<br>Er umsøkjarin umboðaður í Føroyum av partafelag, skal eisini upplýsast um navn og bústað nevndarlimanna. |
| Móðurfelag: | Navn, bústaður og skrásetingarstað móðurfelagsins. |
| Nevnd og stjórn móðurfelagsins: | Nøvn á nevndarlimum og stjórn móðurfelagsins |
| Partaeigarar: | Partaeigarar við 10% eigaraparti ella meira og/ella sum hava avgerandi ávirkan á felagið. Eigaraparturin hjá hesum skal upplýsast. |
| Samtaksútgreining: | Skrivlig frágreiðing og grafisk lýsing av samtaksbygnaði, íroknað tilknýtt feløg. Frágreiðingin skal lýsa virksemið, tey einstøku feløgini í samtakinum hava. |

## 2. Fíggjarviðurskifti

| | |
|---|---|
| Kredittmeting: | Umsøkjarar og móðirfeløg teirra, ið verða kredittmett av altjóða fyritøkum, sum t.d. Standard & Poors, skulu upplýsa kredittmetingina frá ár 2000 og frameftir. |
| Roknskaparviðurskifti: | Seinasti ársroknskapur fyri samtakið, umsøkjarin er partur av, og fyri umsøkjaran skal viðleggjast. Eisini seinasti almenni perioduroknskapur skal viðleggjast, um hesin er nýggjari enn ársroknskapurin. |